# Roknidømi: Lutvís útleiga

Í døminum galda hesi viðurskifti:

- Samlað fermetratal: 200. Útleigað fermetratal: 75.
- Útleiguár: 3. Útleigudagar um árið: 100.
- Árlig leiguinntøka: 50.000. Skattaprosent: 40.

At finna lutfall

Í lutvísari útleigu skal frádrátturin svara til lutfallið millum A) tal á leigudøgum í mun til eitt ár og B) tal á útleigaðum fermetrum í mun til samlaðar fermetrar. Vit fáa hesi tøl:

A) Lutfall millum tal á leigudøgum í mun til eitt ár: 100/365 = 0,274

B) Lutfall millum tal á útleigaðum fermetrum í mun til samlaðar fermetrar: 75/200 = 0,375

Til at fáa rættan frádrátt skulu allar útreiðslur í hesum dømi nú faldast við 0,274 og 0,375.

Rakstrarútreiðslur: (Leypandi árligar útreiðslur at halda leigumáli koyrandi

- Árlig orkunýtsla, el og olja til øll húsini:........................................................... 10.000 kr.
- Árligt tryggingargjald fyri øll húsini: ........................................................... 3.500 kr.
- Rakstrarútreiðslur í alt: ........................................................................... 13.500 kr.

Rakstrarútreiðslur at draga frá: (13.500 x 0,274 x 0,375) ................................................ 1.387 kr.

Viðlíkahaldsútreiðslur: (Útreiðslur sum standast av sliti í sambandi við útleigu)

- Máling: Livitíð, 8 ár (10.000 x 3/8)* ............................................................ 3.750 kr.
- Kaffimaskina: Livitíð, 3 ár (1.200 x 3/3)* ....................................................... 1.200 kr.
- Viðlíkahaldsútreiðslur í alt: ..................................................................... 4.950 kr.

Viðlíkahaldsútreiðslur at draga frá: (4.950 x 0,274 x 0,375) ............................................ 509 kr.

*) 8 ár skulu ganga, áðrenn máling kann dragast fult frá. Verður málað eftir 3 árum, kunnu 3/8 av útreiðslunum dragast frá. 3 ár skulu ganga, áðrenn kaffimaskinan kann dragast fult frá. Sí áramál fyri aðrar útreiðslur í Áramál fyri, nær viðlíkahaldsútreiðslur í sambandi við húsaleigu kunnu dragast frá.

Stovningarútreiðslur: (Útreiðslur til at stovna leigumál)

Útreiðslur til leysafæ kunnu avskrivast við 30% um árið. Útreiðslur til fastafæ kunnu ikki avskrivast.

- Seingjarklæði: ...................................................................................... 400 kr.
- Tallerkar: ......................................................................................... 300 kr.
- Handklæði: ........................................................................................ 500 kr.
- Stovningarútreiðslur í alt: ........................................................................ 1.200 kr.

Stovningarútreiðslur at draga frá: (1.200 x 0,3 x 0,274 x 0,375) ....................................... 37 kr.

Árlig leiguinntøka eftir skatt og frádrátt:

Skattskyldig inntøka: (50.000 - 1.387 - 509 - 37) ........................................................ 48.067 kr.

Skattur, við skattaprosenti á 40: (48.067 x 0,4) ......................................................... 19.227 kr.

**Úrslit: ............................................................................................... 28.840 kr.**